Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

6. september 2021

# Vegleiðing um flokking

Viðgerð okkara av umsóknum um flokking bera í sær fleiri neyv og tíðarkrevjandi stig. Tí er alneyðugt, at innkomnar umsóknir eru væl úr hondum greiddar og fylgja ásettum krøvum. Endamálið her er tí at gera greitt, hvør leistur má fylgjast, fyri at umsókn um flokking/umflokking er fullfíggjað.

## Bygnaður

Fyri at gera starvssammetingar eru neyðugt við organisatiónsdiagrammi, sum vísir starvsfólkaheiti, og hvussu hesi størv eru flokkað í mun til tað starvið, sum ynski er um at flokka/umflokka. Hugsa um líknandi størv eru frammanundan í organisatiónini og upplýs, hvussu hesi størv eru flokkað. Eru sambærilig størv, má ansast eftir, at nýggja flokkingin ikki skeiklar tær flokkingar, ið eru í organsatiónini/arbeiðsplássinum frammanundan. Kanna gjølla um starvið er flokkað frammanundan. Met um, hvørt møgulig upprunalig flokking alsamt eigur at vera galdandi.

## Hentar allýsingar

*Flokking* verður brúkt í sambandi við lønaráseting til nýggj størv við støði í organisatiónsdiagrammi, lønarflokki og møguligari viðbót. Eitt starv skal vera flokkað, áðrenn lýsing eftir starvsfólki fer út.

*Nýtt starv* merkir, at talan er um nýggjar uppgávur ella víðkan av verandi uppgávum, sum innihaldsliga gera, at starvið fær heilt annað innihald enn upprunaliga. Bygnaðarligar broytingar kunnu føra við sær, at eitt nýtt starvsøki verður skipað.

*Umflokking* verður brúkt í sambandi við broyting av løn fyri verandi starv.

*Munandi broytingar í starvinum* er at skilja sum, at starvsinnihald er grundleggjandi broytt samanborið við tær uppgávur, sum eitt starvsfólk áður hevur havt, sí frágreiðing niðanfyri.

*Starvslýsingin* lýsir starvsøkið, har niðanfyristandandi er ásett:

- Førleikakrøv t.d. útbúgving
- Týdningarmestu arbeiðsuppgávurnar
- Lýsing av ábyrgd næst yvir og næst undir
- Flokking av næst yvir og næst undir
- Leiðslustarv – starvsfólkatal og fíggjarlig ábyrgd/játtan

## Munandi broytingar í starvinum

Broytingar í starvinum kunnu til dømis koma fyri, tá broyting er í innanhýsis mannagongdum ella leiðsluuppgávum, í sambandi við økta ábyrgd av uppgávum, og tá framhaldsútbúgving krevst fyri framhaldandi kunna røkja starvið.

Ein broyting kann vera knýtt at einum dagstevndum degi, t.d. ein lógarbroyting kann hava við sær eina innanhýsis broyting í arbeiðsgongdini. Kann tað ikki ávísast, at broytingin í starvinum er dagstevnd, er talan um eina glíðandi gongd, ið eigur at verða tikin upp við samráðingum.

## Viðbøtur

Er partur av starvinum at hava vakt, kann viðbót verða latin. Umráðandi er tá, at neyvt verður lýst, hvussu tyngjandi vaktin er:

- Hvussu ofta ringir vakttelefonin um vikuna/mánaðin?
- Kann tilkallið avgreiðast umvegis telefon, ella má starvsfólkið fara frá húsum?
- Er krav um, hvussu skjótt vaktin skal kunna møta?
- Nevn dømi um hvørjar uppgávur tilkallað verður til

## Send KAF umsóknina

Umsókn um flokking/umflokking verður at senda Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum saman við starvslýsing og omanfyrinevndu upplýsingum, ið eru ein fortreyt fyri at viðgera umsóknina:

- Organisatiónsdiagramm við starvsfólkaheitum og flokkingum
- Lýsing av líknandi størvum í organisatiónini/arbeiðsplássinum
- Lýsing eftir starvsfólki
- Førleikakrøv
- Týdningarmestu arbeiðsuppgávurnar
- Lýsing av ábyrgd næst yvir og næst undir
- Flokking av næst yvir og næst undir
- Er talan um leiðslustarv, upplýs starvsfólkatal og fíggjarliga ábyrgd/játtan

Er talan um at áseta viðbót, sí brotið, Viðbót.

Gev gætur, at umsókn um flokking/umflokking skal viðgerast saman við avvarðandi fakfelagi. Umráðandi er tí, at umsóknir um flokking/umflokking verða sendar KAF í góðari tíð, soleiðis at semja kann gerast við avvarðandi fakfelag um flokkingina, áðrenn starvið verður lýst leyst.

*Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, 6. september 2021*